um. Nú vita øll, sum kenna Einar, at hann er ein stórur diplomatur, at at hann, tá hann vil, kann siggja ógvuliga meinaleysur út. Hann segði við tollararnar, at vit vóru átta føroyingar, sum komu til hesa gomlu søguoyggj, og at vit ætlaðu okkum at ferðast her í Íslandi, á landi við bilum og á sjónum rundan um landið við »Esju«, men vit høvdu ov lítið av magasýru, og hann vist av royndum, at »egil veiki« ikki var góður fyri magasýrutómar búkar, um tað ikki mundi bera til at fáa tveir kassar við »Hof« í land við okkum?

»Eg kenni »Egil«, segði tollarin, »hann er ikki góður fyri nakran kýk, hvørki sjúkan ella frískan, takið tit bara ølið í land við tykkum, men takið ikki kassarnar í land, fáið tykkum ølið í posar, so er alt í lagi.«

Einar brendi til kokkin, og eitt tvey trý, so kom hann aftur við trimum tómum eplasekkjum, men nú ráddu um at fáa ølið úr køssunum, og einki var at fáa kassarnar upp við uttan berir fingrar, og nú legði »Drottningin« til kaiina. Tað er ótrúligt, ta megi ein tystur maður fær í fingrarnar, tá tað ræður um at opna tveir kassar við »Hof« pilsnarum. Tað var ein handavending, so høvdu vit loyst jarntræðrirnar av køssunum og fingið fløskurnar í posarnar, men skramblið var øgiligt.

Meira

Dagsins mál og skúlin

Sum flest onnur bløð so hevur eisini tað lokala Tíðindablaðið fleiri regluligar teigar. Ein av hesum ber tað víttfevnandi heitið: Dagsins Mál. Er væl ætlaður sum ein kollektivur røðarapallur, har næstan ein og hvør kann føra fram ymiskt, ið kann hava tann almenna áhugan.

Eitt »forum« sum ein av okkara kendu løgtingsmonnum vildi rópt teigin.

Tó eitt heldur exclusivt forum við áhhhhhhhhh-so-líkum-skrivingarhætti-og-einum-áhhhhhhh-so-siðiligum-penni-tí-soleiðis-skrivar-man-nú-einaferð-sakligar-hugleiðingar-um-dagsins-mál. ja.

Í hesum teigi hevur nú fyri stuttum verið stórt tjak um okkara skúla.

Stórur partur av tí lokalu mentunnar elituni hevur roynt at funnið útav, hvat ein føroyskur skúli er fyri nakað. Hesir harrar í andanna ríki hava við vælundirstuðlaðum høvuðssetningum, vælbrýndum eykasetningum, korrektum syntaxi og grammatiskum konformiteti greitt frá teirra sannføringum hesum evni viðvíkjandi.

Har er skrivað um uppruna til orðið skúla, rumblið í Hoydølum, okkara leiðandi internorrøni høvundur heldur, at føroysk **børn banna ov illa. Vit hava** hoyrt um fyriskipanir, lógir, samtyktir, nevndarviðgerðir, politiska ábyrgd, citatir úr skúlabløðum og so heilt - privat - nostalgiskar-meiningar.

Nú skal eg ikki koma og taka dagar ímillum um fyrrnevnda skriving er sprottin av hugsjónum, idealismu, alsk til skúlaskap ella er verbalt loftlop og oratorisk prestigu skriving. Eg taki undir við fleiri av teimum álvarsomu og viðkomandi hugsanum, sum fram eru komnar.

Sjálvandi skulu øll skúlamál vera á føroyskum hondum.

Tað vil vera trupult áðrenn vit koma so langt, og tað vilja verða nógvir vansar ið á skullu vinnast, ein kann tó ikki gera eitt speil egg uttan at knúsa skalið.

Men, men, men.

Av og á hevur fyrrnevnda tjak tó minnt dekan og nógv á teir disputarnar sum fór fram millum lærarar og næmingar í 17 og 18 øld. Har sótu hesir garpar í fullum álvara og tjakaðust um veingir einglanna vóru tilevnaðar burtur úr fjaðrum ella beini!

— Eg søknist eftir einum almennum tjaki, sum veruliga viðrørir okkara skúla, hann veri so føroyskur ella ikki.

Um støðu skúlans í okkara samfelag.



Um útbúgving barnsins í mun til samfelagið.

Um tað sum verður kennt.

Um trivna barnsins í skúlanum.


Um tann nýtta pedagogikkin í okkara skúla.

osfr. osfr.

Um sama orka var nýtt til slíkt tjak sum hon, ið var nýtt í Dagsins Máli, so skuldi okkurt spurtst burturúr.

Um skúlin ikki hevur samband við tað samfelag, hann virkar í, so er tað etandi líkasælt um hann er føroyskur, suðurafrí[1] anskur ella okkurt triðja ella fjórða.

Johan hot Mortensen



1. PARTUR

Aldri áður havi eg sæð vinmann mín í betri hýri enn í árinum 95.

Persónur hansara, sum støðugt gjørdist betri umtóktur, hevði sjálvsagt skuldina av øllum hesum. Og eg hevði kent meg ótrúgvan móti honum, um eg kom fram á nakað, sum bar boð um vitan millum viðskiftafólk okkara, og sum varð likið út úr skrivstovu okkara í Baker Street.

Men Holmes livdi sum aðrir stórlistamenn einans fyri listina. Og við undantøku av málinum um hertogan av Halderness er at siga, at eg sjáldan havi verið vitandi um, at vinur mín hevur kravt stórar peninganøgdir fyri ómetaligu tænastur hansara.

Slíkur var vinmaður mín, at hann ofta slerdi av at hjálpa mætum og ríkum. Hetta var, tá hann onga samkenslu segði seg hava fyri málinum.

Hinvegin kundi hann mangan hjálpa fátækum, bert um málið hevði tey løgnastu viðurskifti til innihalds. Tí í slíkum málum fekk hann rættiligar møguleikar til at nýta flogvit sítt.

Í minnisríka árinum 95 hevði hann gjørt hópin av kanningum. Og tær høvdu gjørt hann kendan.

Eitt av málunum, sum kravdu gjølligar kanningar, var Peter Carey-málið. Til málið vóru knýttar loyndarfullar umstøður. Og hesar umstøður kravdu lív Peter Careys.

Eingi uppskrift um harra Sherlock Holmes og virki hansara høvdu verið bein og fullfíggjað, um tey ikki eisini høvdu til innihalds viðurskiftini hjá Peter Carey.

Í teirri fyrstu vikuni av juli hevði vinmaður mín ofta og hartil leingi verið heiman. Hetta fekk meg til at hugsa, at okkurt spennandi fór at henda.

Eisini tað, at hópur av fremmandum monnum javnan spurdu eftir Holmes, eisini Basil, kapteynur, fekk meg til at hugsa, at hann mundi vera virksamur í løtuni. Og at hann hevði tilhald í løgnum støðum, samstundis sum hann nýtti ymisk nøvn, ið ikki skuldu avdúka hann.

Hann hevði ið hvussu er fimm ymisk tilhaldsstøð í London. Á ongum sinni gretti hann fyri mær, hvat hann hevði fyri.

Og eg noyddi hann heldur á ongum sinni til at siga mær nakað.

Fyrsta tekinið til virksemi hansara fall mær í lut á ein løgnan hátt.

Hann var farin uttar áðrenn morgunmat, og eg hevði júst fingið mær sæti og reikaði fyri mínum morgunmati, tá hann kom innar í stovuna við hatti á høvdinum og onkrum, sum minti um eitt regnskjól, undir arminum.

— Tú góðasti, Holmes, segði eg. — Tú fer ikki at siga mær, at tú hevur gingið við hasum í býnum.

— Eg havi verið hjá sláturmanninum.

— Hjá sláturmanninum, spurdi eg bilsin.

— Og eg eri komin aftur higar. Við einum ómetaligum góðum matarlysti. Eingin hevur fyri neyðini at ivast um, hvønn týdning fimleikur hevur, áðrenn morgunmatur verður etin, mín góði Watson. Men eg fari at leggja høvur mítt á blokkin sum prógv fyri, at tú ikki veit, hvat tað er fyri ein fimleikur, eg havi íðkað.

— Eg tori ikki at gita, svaraði eg.

Hann flenti, meðan hann skonkti kaffi í kopparnar.

— Um tú hevði hugt innar í handilin hjá Allardyce, hevði tú ivaleyst sæð ein deyðan grís hingið niður úr loftinum og ein mann við uppbrotnum skúrtuermum kvika sær at skera grísin upp.

Tað var eingin annar enn eg, sum royndi at skera grísin upp. Men eg eri vorðin vitandi um, at eg hóast nýtslu av allari megi, ikki kann gera nakað við grísin. Ikki so mikið sum vika honum. Men kanska hevur tú hug at royna?

Fyri alt í verðini ikki tað. Men hví gjørdi tú royndir til at skera grísin upp?

Enn einaferð gav eg vinmanni mínum andsvar upp á løgnu spurningar hansara.

(Framhald)